ítróttur

Nr. 186 • hósdagur • 30. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

NSÍ-leikari fer til Everton

16 ára Johan Troest Davidsen, sum í ár hevur verið kring besta NSÍ-liðið, fer í næstum at gera trý ára sáttmála við enska Premier-League felagið

FÓBÓLTUR
Jákup Mørk

Herfyri var Johan á venjingarferð í Everton, og eftir øllum at dømna vóru teir í felagnum somikið væl nøgdir um tað, sum teir sóu, at teir nú hava boðið runavíkinginum trý-ára sáttmála. Her eru hann (hm.) og Kristian Restorff Mouritesen (vm.) avmyndaðir saman við einum íslendskum leikara

Á føroyska U-17 landsliðnum var eitt av avgjørdu álitunum á liðnum, tá hesir herfyri stóðu seg framúr væl í Finnlandi, og á U-19 landsliðnum verður hann uttan iva eitt av verjuálitunum, tá teir í næstum skulu royna seg í altjóða fótbóltskapping.

Ivaleyst er hann eisini millum leikararnar, sum mongu talent-skótarnir tá kundu hugsað sær at hugt nærri at, men alt bendir á, at tað tá ikki er stórvegis at heinta hjá hesum.

16 ára gamli Johan Troest Davidsen fer nevnliga fyrsta dagin at skriva sáttmála við enska Premier League felagið, Everton, og verður talan um sáttmála, sum komandi trý árini fer at binda hann at felagnum.

Enn eru tíðindini ikki váttað. Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá leikaranum, sigur seg onga viðmerking hava til málið í løtuni, og tað hevur heldur ikki eydnast okkum at fáa nakra viðmerking úr Everton. Sosialurin veit tó frá álítandi keldum, at pappírið verður undirskrivað fyrsta dagin, og so kann runavíkingurin royna seg í fótasporunum hjá leikarum sum Wayne Rooyne, Francis Jeffers, og øðrum leikarum, sum hava fingið sína fótbóltsuppaling í bláa Liverpool-felagnum.

Jákup Mikkelsen til B36

Jákup Mikkelsen fer komandi tvey árini at verja málið hjá B36. Avtala er gjørd millum partarnar, sum komandi tvey árini bindur landsliðsmálverjan at árstalsfelagnum.

Orsøkin til skiftið er fyrst og fremst, at Jákup gongur á læraraskúlanum í Havn, og at tað tí kann gerast møtumikið við ferðing aftur og fram hvønn dag.

Umframt at vera málverji, skal Jákup eisini virka sum málmansvenjari í felagnum.

-jm

Elspa í essinum

Hóast hon bert er 12 ára gomul, hevur Elspa Mørkøre longu svomið undir kravtíðirnar til Oyggjaleikirnar. Hartil setti hon tvey føroysk met og eitt bólkamet á Suðuroyar Stevnuni um vikuskiftið

SVIMJING
Jákup Mørk

Elspa Mørkøre úr Fuglafirði gjørdi eitt ordans hál, tá hon setti tvey nýggj føroysk met um vikuskiftið

Stór svimjikapping var í Vági um vikuskiftið, har svimjarar úr sjey felaganum tóku lut. Kappingin fevndi um bólkarnar 4 og 5.

Hóast talan er um kapping, sum liggur somikið tíðliga á svimjiárinum, so var hugaligt at síggja, at tvey nýggj føroysk met vórðu sett.

Bæði vórðu tey sett av bara 12 ára gomlu Elspu Mørkøre úr Fuglafirði, sum avgjørt má roknast sum eitt av heilt stóru føroysku svimjitalentunum.

Elspa hevur júst skift aldursbólk, og eisini í bólki 4, sum hon svimur í, setti hon nýtt met. Hetta setti hon í 200 metra ryggsvimjing í tíðini 2.29,8.

Tey bæði føroysku metini, sum Elspa setti, vóru í 200 metra blandað við 2.30,80 og í 50 metra rygg í tíðini 0.31,69.

Samstundis sum talan var um føroysk met, gevur hetta eisini Elspu rætt til luttøku á komandi Oyggjaleikum, og tað má sigast at vera satt bragd hjá bara 12 ára gomlu gentuni.

Umframt metini hjá Elspu, vórðu bæði silvur- og bronsunálir lætnar trimum svimjarum. Kári J. á Høvdanum, sum eisini svimur í Fuglafirði, fekk silvurnál fyri at svimja 200 metra rygg í 2.29,8, og Anna Maria Midjord úr Vági og Sólvá Túna Rúnadóttir av Tvøroyri fingu bronsunálir.

Tá talt varð saman, hevði Fuglafjarðar svimjifelag vunnu nógv tey flestu heiðursmerki. Samlaða býtið av metallinum gjørdist hetta:

Felag	Gull	Silvur	Bronsa
Fuglafjarðar Svimjifelag	24	4	2
Tvøroyrar Svimjifelag	17	12	6
Flot	12	8	3
Ægir	11	5	2
Vágs Svimjifelag	6	11	2
Skeggjar	6	6	7
Havnar Svimjifelag	6	4	3

Taptu 3-0

Føroyska U-19 landsliðið hjá kvinnum er í hesum døgum í Pólandi, har tær taka lut í sonevndari mini-kapping.

Fyrsti dysturin var á skránni týsdagin, tá tær leiktu móti vertstjóðini í einum dysti, sum Póland vann 3-0.

Støðan í hálvleikinum var 1-0, men seinnapartin av seinna umfarinum skoraðu pólversku kvinnurnar so tvær ferðir.

Hósdagin verður næsti dysturin hjá føroyska liðnum á skránni. Hann verður móti Belgia, og seinasti dysturin verður so móti Kroatia.

-jm

Í Býin



Vikumenu

Forrættur
Fiskasúpan, borðreidd við øllum góðum úr havinum, og heimabakaðum breyði

Høvuðsrættur
Búffur av oksafilet, við rótfrukt sautø og reyðvínssauce.

Dessert
Innbakaður rabarbuísur, við bláberja coulis og frískari frukt.

2. Rættir/courses Kr. 198,-
3. Rættir/courses Kr. 238,-

Borðbílegging á tel 31 11 21

RESTAURANT MERLOT

Sosialurin 141000

FÓTBÓLTSDANSUR
Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
Leygarkvøldið 2. oktober kl. 23.30

SHOWMENN

Bussar hvørja sunnilíðis. Bert við bókning á forhelftan

Tórshavn 22.30 22.33 11 - Tvørir 23.30 50 52 20 - Skúvoy 23.30 50 52 20 - Sandavágur 23.00 50 55 20 - Eiði 23.00 50 55 20

Privat veita

Manhattan PUB & CAFÉ

Livandi tónleikur

Hósk vøldið 30. september:
Double up
frá 21.00-22.00

Fríggjakvøldið 1. oktober
og leygarkvøldið 2. oktober:
Déjà Vu

Upplatingartíðir:
Mánadag - hósdag 12.00-23.30
Fríggjadag - leygardag 12.00-03.30
Sunnudag 17.00-24.00

Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrigøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Klubbadansur

Til dansin leygarkvøldið spælir:

EXPRESS

HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799

Sosialurin 141000

YERTSHÙSÍÐ

SINGLE LEYGARKVØLD
+
TARVA-TÍMAR:
5 x + 2 x = kr. 200,-!
(FRÍGGJAKVØLD KL. 21 - 24)

Fríggjakvøldið
KL. 21.00 - 24.00 TARVA-TÍMAR
KL. 23.00 SÁMAL & RONNIE

Leygarkvøldið
KL. 22.00 SINGLE-KVØLD Í KJALLARANUM
KERTULJÓS, AMORØS DRINKSMENU, HUGNATÓNLEIKUR OG KÆRLEIKI Í LUFTINI
KL. 23.00 DÉJÀ VU SPÆLA

PREMIER- OG CHAMPIONS LEAGUE Á STÓRSKÍGGJA

YERTSHUSÍÐ

Sosialurin 141000